# SÁTTMÁLI UM SKÚLASAMSTARV
# MILLUM
# EYSTURKOMMUNU OG FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

§ 1

Við heimild í § 31 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997, sum seinast varð broytt við løgtingsóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu skipað eitt felags skúlasamstarv, við javnbjóðis ávirkan og ábyrgd, fyri skúlaviðurskifti eftir 7. skúlaár.

## VAVIÐ AV SAMSTARVINUM OG UPPGÁVUR V.M.

§ 2

Skúlasamstarvið ber heitið Framvit og samstarvið fevnir um umrøddu kommunur, og at øll børn eftir 7. skúlaár verða ávist til Framvit.

Kommunurnar varðveita sítt egna skúlaverk fyri øll børn til og við 7. skúlaár

§ 3

Fuglafjarðar kommuna eigur og rekur bygningin, sum verður kallaður "64 skúlin", og nýtir skúlasamstarvið hendan bygningin til skúlagongdina fyri 8., 9. og 10. flokk. Skúlasamstarvið nýtir harumframt aðrar partar av skúlanum í Fuglafirði, har tað er neyðugt og eftir tørvi. Her er talan um felagshølir, svimjihøll, matarsal, serhølir o.a.

Ognarviðurskiftini verða óbroytt, t.v.s at "64 skúlin", og Fuglafjarðar skúli annars verður verandi ogn hjá Fuglafjarðar kommunu. Fuglafjarðar kommuna hevur ábyrgd av, at halda ogninar viðlíka.

§ 4

Allar íløgur í bygningar og undirvísingarhøli til Framvit verða framdar av Fuglafjarðar kommunu.

Skúlastýrið ger tilmæli, um hvørjar íløgur skulu gerast í Framvit, og skúlastýrið skal tryggja, at talan verður um javnbjóðis ávirkan og ábyrgd hjá báðum kommunum fyri íløgurnar, sum verða framdar.

Tilmæli um íløgur fyri Framvit verða lagdar fyri bæði kommunustýrini til góðkenningar.

## FYRISITINGARLIG SKIPAN

§ 5

Uppgávurnar hjá kommunustýrunum mótvegis skúlaverkinum, sum er fevndar av skúlasamstarvinum fyri 8., 9. og 10. flokk, verða yvirtiknar av skúlastýrinum fyri Fuglafjarðar skúla.

Skúlastýrið telur 6 limir og skrivara.

Valskeiðið hjá limunum í skúlastýrinum fylgir valskeiðnum hjá kommunu- og skýlastýrunum. Limirnir verða valdir í millum kommunustýris- og skúlastýrislimirnar í luttakandi kommununum á fyrsta regluliga fundinum eftir nýval og fyri sama valskeið, soleiðis:

| | |
|---|---|
| Eysturkommuna: | 2 limir, eitt kommunustýrisumboð og eitt foreldraumboð |
| Fuglafjarðar kommuna: | 3 limir, eitt kommunustýrisumboð og tvey foreldraumboð |
| Fuglafjarðar skúli | 1 starvsfólkaumboð og skúlastjórin, sum er skrivari hjá skúlasamstarvinum |

Samstundis velja kommunustýrini varalimir í sama lutfalli sum limatalið.

Hesin sáttmáli kemur í gildi í einum valskeiði, og verður skúlastýrið fyrstu ferð samansett soleiðis: Foreldraumboðið úr Eysturkommunu, sum er valt í skúlastýrið í Fuglafjarðar skúla, verður foreldraumboð fyri Eysturkommunu restina av verandi valskeiði. Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna velja hvør sítt kommunustýris-umboð til skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla restina av verandi valskeiði.

Henda skipan kemur í gildi, tá sáttmálin um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu er góðkendur av landsstýrismanninum.

§ 6

Skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla skipar sítt arbeiði sambært rundskrivi um meginreglur fyri skúlastýri frá Mentamálaráðnum, sum hevur heimild í § 57, stk. 3 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, og sambært sáttmálanum um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu.

§ 7

Skúlastjórin í Fuglafjarðar skúla hevur evstu ábyrgdina av Framvit, lærarum og menningini av Framvit. Dagliga umsitingin av Framvit verður partur av umsitingini hjá Skúlanum í Fuglafirði. Framvit nýtir KT skipanirnar og aðrar hentleikar í Fuglafjarðar skúla.

Skúlastjórin í Skúlanum í Eysturkommunu og skúlastjórin í Fuglafjarðar skúla gera á hvørjum ári uppskot til praktiskt samstarv.

Samstarvið fevnir m.a. um hesi viðurskifti:

- samskipan av lærarakreftum
- samskipan av frídøgum og øðrum felags tiltøkum
- felags mannagongd fyri skúlaskifti hjá næmingum
- o.a.

Skúlastjórarnir hava felags ráðleggingarfundir í januar, mai og september á hvørjum ári. Praktiska samstarvið verður viðgjørd og góðkent á fundi í skúlastýrinum í mai mánaði á hvørjum ári. Praktiska samstarvið verður gjørt við støði í undirvísingarætlanunum, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum.

Lærarar í Skúlanum í Eysturkommunu og lærarar í Fuglafjarðar skúla verða settir í skúladøminum fyri báðar skúlarnar. Skúlastjórin í Skúlanum í Eysturkommunu hevur heimild at læna sínar lærarar út til Fuglafjarðar Skúla, og skúlastjórin í Fuglafjarðar skúla hevur heimild at læna sínar lærarar út til Skúlan í Eysturkommunu.

Meirútreiðslur til flutning av lærarum, sum eru settir í Skúlanum í Eysturkommunu, ið verða læntir út til Fuglafjarðar Skúla, og hjá lærarum, sum eru settir í Fuglafjarðar Skúla, ið verða læntir út til Skúlan í Eysturkommunu, eru partur av játtani fyri árligu undirvísingarætlanirnar hjá Skúlanum í Eysturkommunu og Fuglafjarðar skúla, sum landsstýrismaðurin góðkennir.

## FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI

### § 8

Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna rinda rakstrarútreiðslur til Framvit Skúlastýrið ger uppskot til fíggjarætlan, sum verður løgd fyri býráðini til góðkenningar. Uppskotið skal vera latið kommununum áðrenn 15. september.

Skúlastýrið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan at játtan frammanundan er útvegað frá kommununum.

### § 9

Fuglafjarðar kommuna og Eysturkommuna bera í felag kostnaðin av framtíðar íløgum í "64 skúlan". Íløgurnar verða lutaðar millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu soleiðis, at hvør kommuna útvegar sín prosentvísa part av íløguni, við støði í næmingatalinum í einstøku kommununi í mun til samlaða næmingatalið í báðum kommunum frá 1. til 9. flokk. uppgjørt pr. 1. januar tað árið, íløgan verður framd.

Rakstrarútreiðslurnar av Framvit verða býttar millum kommunurnar fyri hvørt roknskaparár, sum gongur frá 1. januar til 31. desember. Rakstrarútreiðslurnar verða lutaðar millum kommunurnar í mun til talið av børnum, sum send verða til Framvit, uppgjørt við skúlaáarsbyrjan og pr. 1. januar á hvørjum ári.

Rakstrarúteiðslurnar fara serstakliga til:

1. viðlíkahald av bygningi og innbúgvi
2. ljós, hita, reingerð, trygging v.m.
3. nýútveganir av undirvísingartilfari og innbúgvi, umframt ískoyti til savnstilfar
4. lønir og samsýningar í tann mun tær ikki verða goldnar av landskassanum ella øðrum stovnum
5. útreiðslur til umsiting av Framvit, her í millum samsýning til neyðug hjálparfólk

Endauppgerð av útreiðslupartinum hjá kommununi verður gjørd í sambandi við, at endaligur grannskoðaður roknskapur verður latin kommununum.

## ROKNSKAPUR OG GRANNSKOÐAN

### § 10

Eftir lokið roknskaparskeið útvegar skúlastýrið ein roknskap við tilskilan um býti av útreiðslunum fyri skúlasamstarvið. Roknskapurin verður grannskoðaður av einum góðkendum grannskoðara.

Áðrenn mai mánaður er úti, verður grannskoðaði roknskapurin við grannskoðaraátekning og hartil atknýttum svari og viðmerkingum frá skúlastýrinum, sendur kommununum. Í seinasta lagi ein mánað eftir móttøku av roknskapinum rinda kommunurnar skuld teirra sambært roknskapin til skúlasamstarvið.

### § 11

Tekur ivi seg upp um, hvussu hesin sáttmáli skal skiljast ella nýtast, verður spurningurin endaliga avgreiddur av landsstýrismanninum.

Áðrenn avgerð verður tikin, tekur landsstýrismaðurin um neyðugt upp samráðingar við skúlastýrið og báðar kommunur.

## GILDISKOMA OG UPPATHALD

§ 12

Hesin sáttmáli tekur við tann 1. august 2017, og er bindandi 20 ár fram til 1. august 2037.

Sáttmálin kann av øðrum av pørtunum sigast upp við 3 ára freist til ein 1. august, tó ikki fyrr enn til 1. august 2037.

3 ár áðrenn 1. august 2037, viðgera kommunustýrini sáttmálan, gera neyðugar dagføringar og áseta nýggja gildiskomu.

Fullgildug uppsøgn av sáttmálanum kann bert verða gjørd við innskrivaðum brævi til skýlastýrið innan ásettu freist.

Sáttmálin um skúlasamstarvið kann tó nær sum helst fara úr gildi, tá kommunurnarr eru samdar um hetta, ella tá landsstýrismaðurin sambært áheitan frá eini kommunu metir, at rímulig orsøk er til uppathald. Uppsøgn av sáttmálanum fer í tílíkum førum fram við 3 ára varningi til endan á viðkomandi skúlaári.

Eru luttakandi kommunurnar samdar um ta uppgerð og avrokning, sum uppsøgnin ber í sær, skal henda leggjast fyri landsstýrismannin til góðkenningar. Eru kommunurnar ósamdar, verða treytirnar fyri uppsøgnini ásettar av landsstýrismanninum.

§ 13

Hesin sáttmáli verður lagdur fyri landsstýrismannin til góðkenningar.

Fuglafjørður, tann 31 /08 2017

| | |
|---|---|
| Eysturkommuna | Fuglafjarðar kommuna |
| Jóhan Christiansen, borgarstjóri | Sonni á Horni, borgarstjóri |
| Erik Lervig, kommunustjóri | Jákup Frants, kommunustjóri |

# ÍSKOYTI

# TIL

# SÁTTMÁLAN UM SKÚLASAMSTARV
# MILLUM
# EYSTURKOMMUNU OG FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Undiritaðu partar eru samdir um at gera hetta ískoyti til § 12 í sáttmálanum um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu:

Í sambandi við møguliga uppsøgn – uttan mun til orsøk – og uppgerð og avrokning í tí sambandinum, skal atlit takast til møguligar íløgur eftir § 9, soleiðis at íløgan verður afturrindað tí partinum, ið ikki eigur "64-skúlan", við 20/20 av íløguni fyrsta árið eftir, at íløgan er gjørd, minkandi við 1/20 fyri hvørt eftirfylgjandi ár síðan íløguna.

Hetta ískoytið verður lagt fyri landsstýrismannin til góðkenningar.

Fuglafjørður, tann 31 /08 2017

Vegna Eysturkommunu

Jóhan Christiansen, borgarstjóri

Erik Lervig, kommunustjóri

Vegna Fuglafjarðar kommunu

Sonni á Horni, borgarstjóri

Jákup Fransts Larsen, kommunustjóri